Løgmannabreyt, tann 15. novembur 2017

Góðu næmingar og foreldur

Nú nærkast jólini, og sum vant eru onkrar broytingar í tímatalvuni. Her er eitt yvirlit yvir skúlagongdina í desembur mánað og kunning um, nær jólahaldið verður.

| | |
|---|---|
| Fríggjadagin 1. desembur | 1. - 4. tíma gera vit jólaprýði og prýða skúlan. Allir næmingar eiga at hava saks og límstift við í skúla.<br>Vanlig undirvísing er eftir 4. tíma.<br><br>Kl. 15-17 er tiltakið "Í menniskjum góður tokki" í skúlanum. Næmingar hava gjørt ymiskt at selja, lutaseðlasøla verður, og myndirnar frá myndatøkuni kunnu avheintast. |
| 1. – 15. desembur | Morgunsangur verður í námsfrøðiliga deplinum hvønn dag kl. 9.15. |
| 4. -15. desembur | Vanlig undirvísing. |
| Mánadagin 18. desembur | Vit leggja síðstu hond á jólaframførslurnar.<br>1. – 2. flokkur møtir eftir vanligu tímatalvuni og fer síðani í frítíðarskúla.<br>3. – 9. flokkur møtir klokkan 8.00-12.35.<br>3. flokkur hevur hugnaløtu í skúlanum til kl. 13.20, tá frítíðarskúlin letur upp. |
| Týsdagin 19. desembur | Allir flokkar møta kl. 8.00 í skúlanum.<br>Vit venja til jólahaldið og hava frumframførslu.<br>Øll fáa frí kl. 11.20, tó hava tey, sum skulu í frítíðarskúla hugnaløtu í skúlanum til kl. 13.20, tá frítíðarskúlin letur upp.<br><br>Jólahald verður fyri næmingum, foreldrum og systkjum klokkan 16.00-18.00<br><br>Í desembur mánað fáa tit meira kunning um jólahaldið. |
| Mikudagin 20. desembur | Øll møta kl. 8.00 í skúlanum. Kl. 9.00 fara vit til jólaguðstænastu í Hoyvíkar kirkju.<br><br>Tá jólaguðstænastan er liðug, fara øll niðan í skúlan aftur til jólatræ fyri næmingum og lærarum í 1. – 9. flokki.<br>Í ár fara vinarflokkarnir at dansa jólatræ saman.<br><br>Øll hava frí kl. 11.20, tó hava tey, sum skulu í frítíðarskúla hugnaløtu í skúlanum til kl. 13.20, tá frítíðarskúlin letur upp. |

*Blíðastu jólaheilsanir*
*Skúlin við Løgmannabreyt*